

Tónleikur

Orca/Gestir konsert ummæli:

# Lovaða stjørnan úr fjósinum

**Leygarkvøldið 19. apríl var konsert við Gestir og ORCA í Bygdarhúsinum á Strondum. Báðir bólkarnir hava gott orð á sær, og fólk vóru spent at vita, hvussu tað mátti fara at ljóða. Úrslitið varð, at fólk fóru avstað aftur við rættiliga blandaðum kenslum**

UMMÆLI
*Pætur G. Larsen*



Bygdarhúsið er torført at finna. Ja, so torført, at eg má biðja um hjálp frá einum staðkendum bygdamanni. Tað er ikki ein og hvør, ið tímir at brúka sovorðna tíð uppá at leita eftir einari konsert langt úti á bygd. Eg eri tí rættiliga sannførdur um, at øll tey, ið hava leitað sær inn higar, eru her fyri at hoyra tónleikin og ikki bara fyri hugnan í tí.

## Stemningsfullur larmur

Tá eg endiliga komi inn í lítla hølið í bygdarhúsinum, er tað næstan fultsett. Eyka stólar verða settir upp úti við síðuna, so øll sleppa at sita. Tað fyrsta, eg beri eyga við, eru øll tey løgnu ljóðførini, ið fylla pallin. Ein pelabassur, ein sýrudunkur, eitt fløskuorgul og ein gøtu kustur eru nøkur av ljóðførinum, ið ein sær.

Rúmið er dimmlitt, og mesta av ljósinum kemur frá eini video uppvørpu, ið lýsir upp á pallin, sum síðani kastar ljósið út aftur yvir áhoyraranar. Tað er ein góður stemingur her inni, ið Knút Háberg Eysturstein skapar við at leggja góðan tónleik á sín plátuspælara. Fólk hugna sær og práta óført, ímeðan tey bíða eftir, at konsertin skal byrja. Fólk tykjast eitt sindur forvitin at hoyra hesar báðar bólkar, kanska helst ORCA við teimum løgnu ljóðførunum.

ORCA leggur út, og sjálvt um fjøldin er lítil, klappar og floytar hon, meðan manningin gongur upp á pallin at finna síni ljóðføri. Tað er næstan sum at vera til fótbóltsdyst, so spentir eru áhoyrararnir. Bólkurin byrja at spæla, og tað tekur teimum bert ein sang at fáa øll við uppá tað. Fólk eru bergtikin og rúnarbundin av tónleikinum.

Ymsar myndir og video verða sýndar á eitt lørift, sum hongur handan pallin. Hetta skapar ein heilt serligan dám. Tónleikurin er transukendur, og til tíðir droymi eg meg í annan heim, ímeðan myndirnar spakuliga skifta.

Aftaná næsta sangin hoyrist ein øgiligur larmur, men eingin tykist at taka sær av tí. Tað hoyrir bara til framførsluna. Men Kári, forsangarin í bólkinum, greiðir frá, at tað er ein luft kompressari, sum ger, at ljóðførini kunnu virka, og til tíðir tendrast hann og larmar óført.



*Núverandi manningin í Gestir er Ólavur Jákupsson á gittara og vokal, Torfinnur Jákupsson á gittara, Jens L. Thomsen á bass og Jógvan Andreas á Brúnni á trummur* Mynd: Kristfríð Tyril



*Orca eru Jens L. Thomsen á hegnpelabass, Bogi á Lakjuni á einstreingjaða slide rørlampu, Ólavur Jákupsson á fløskuorgul og vokal, Jógvan Andreas á Brúnni á ymsar tunnur úr plasti og jarni, og Kári Sverrisson á oljutunnuharpu, boga og sag og vokal* Mynd: Kristfríð Tyril

## Eysturlendskt fólkatekno

Tá ORCA hevur spælt nakrar sangir, royni eg at samanbera, hvør annar ljóðar soleiðis, men eg komi ikki á nakran. Kári spælir uppá okkurt, ið ljóðar sum ein eysturlendsk harpa, ímeðan tað, hann syngur, ljóðar sum okkurt fólkakent. Rútmurnar hjá trummuleikaranum, Jógvan Andreas, ljóða uppá onkran máta teldugjørdar, sjálvt um tær eru frá einari luftslangu og ymsum tunnum. Heildin minnir um ein føroyskan fólkatónleikara, sum hevur búð í eysturlondum í nøkur ár og gjørt aukustiskan tekno tónleik. Ljóðar kanska eitt sindur løgi, eg veit. Men tað er tann tættasta samanberingin, eg kann koma til.

Tað kemur sum ein skelkur aftaná bert nakrar fáar sangir, tá Kári sigur okkum, at teir nú skulu spæla sítt síðsta lag. Tí eg helt, at teir lógu inni við meira av tilfari. Tá hesin sangurin er liðugur, klappa øll og reisa seg fyri teimum. Og sjálvandi verða teir klappaðir uppaftur á pallin. Kári sigur síðani, at teir til allarsíðst skulu spæla ein nýggjan sang. Og her er tað, ið eg haldi er mest áhugavert: Eykalagið hjá ORCA, sum eisini er tað nýggjasta, er tað, mær dámar best. Tað sigur mær so mikið, at bólkurin er í fer við at blíva betri. Aftaná sangin reisast øll enn einaferð og klappa, sum manningin gongur av pallinum.

## Stílfullur larmur

Tað eru ivaleyst mong, ið hava roynt at sett seg við eitt ómetaliga dýrt og flott ljóðføri, men tað einasta ljóðið, ið ein hevur fingið klimprað burturúr, er óljóð. ORCA er akkurát mótsetningurin av hesum. Manningin í bólkinum er partur av elituni innan føroyska tónleikapallin, men hetta kvøldið spælda teir uppá heldur vánalig ljóðføri, sum stemma illa. Ljóðførini tykjast vera torfør at spæla uppá og klossut at stemma. Serstakliga